# Privatlívspolitikkur/Dátuverndarkunning

Inventar Tænastan hevur dátaábyrgd av upplýsingunum, sum vit savna um teg, og vit tryggja, at tínar persónupplýsingar verða viðgjørdar sambært ásetingunum í dátuverndarlógini.

Vit taka tína dátuvernd í álvara og hava tí viðtikið hendan privatlívspolitikk, sum sigur tær, hvussu vit handfara tínar persónupplýsingar.

### Kontaktupplýsingar

Um tú ynskir at venda tær til okkum viðvíkjandi okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum, kanst tú gera tað fylgjandi:

Inventar Tænastan
Smyrilsvegur 7
110 Tórshavn,
Føroyar

inventar@inventar.fo ella +298 613800

# Viðgerð av persónupplýsingum

Persónupplýsingar eru allar upplýsingar, sum á ein ella annan hátt kunnu vísa til tín. Um so er, at tú ikki ynskir, at vit viðgera hesar upplýsingar, kann tað gerast trupult at varðveita og halda møguligar avtalur.

### Møguligir kundar

Um tú ynskir at verða kundi hjá okkum, er neyðugt, at vit fáa fylgjandi persónupplýsingar um teg:

- Navn
- Bústaður
- Telefonnummar
- Teldupostur

Persónupplýsingar um kundar verða savnaðar til fylgjandi endamál:

- Møguligt framtíðar samstarv ella keyp
- Fyrisiting av tínum sambandi við okkum

Hesar upplýsingar samlast grundað á fylgjandi lógarheimild: Heimilað áhugamál. sbrt. §8, stk. 1, nr. 6 í dátuverndarlógini.

- Heimilað áhugamálið hjá felagnum, sum er at veita tær/virkinum hjá tær eina tænastu, ger tað neyðugt, at vit viðgera hesar persónupplýsingar um teg. Felagið tryggjar, at heimilaðu áhugamálini ikki ganga fram um rættindini hjá skrásetta. Hesar upplýsingar eru oftast innsamlaðar á messum ella øðrum líknandi tiltøkum ella samrøðum osv..

Upplýsingarnar verða goymdar so leingi, sum tað eftir reglunum er loyvt, og vit strika tær, tá ið vit ikki hava tørv á teimum longur. Tíðarskeiðið er treytað av, hvørjar upplýsingarnar eru, og hví tær verða goymdar.

Vanliga verða upplýsingar viðvíkjandi kundum strikaðar, eftir at avtalan er endað, ella tá ið mett verður, at samskiftið ikki er viðkomandi longur.

- Upplýsingar um møguligar kundar strikast 5 ár eftir, at seinasta samskifti var, ella um kundin biður um tað

## Kundar

Um tú ynskir at gerast kundi hjá okkum, er neyðugt, at vit fáa fylgjandi persónupplýsingar frá tær:

- Navn
- Bústaður
- Telefonnummar
- Teldupostur

Persónupplýsingar um kundar verða samlaðar til fylgjandi endamál:

- Viðgerð av tínum keypi og okkara veitan
- Fyrisiting av tínum sambandi til okkum

Hesar upplýsingar samlast grundað á fylgjandi lógarheimild:

- Viðgerðin verður gjørd grundað á: Avtala. sbrt. §8, stk. 1, nr. 2 í dátuverndarlógini

Upplýsingarnar verða goymdar so leingi, sum tað sambært reglugerðini er loyvt, og vit strika tær, tá vit ikki hava tørv á teimum longur. Tíðarskeiðið er treytað av, hvørjar upplýsingarnar eru, og hví tær verða goymdar. Vanliga verða upplýsingar viðvíkjandi kundum strikaðar, eftir at avtalan er endað, ella tá ið mett verður, at samskiftið ikki er viðkomandi longur.

- Upplýsingar um kundar strikast 5 ár eftir, at kundasamstarvið og samskiftið endaði.

## Veitarar og samstarvsfelagar

Um tú ynskir at verða veitari ella samstarvsfelagi hjá okkum, er neyðugt, at vit fáa fylgjandi persónupplýsingar um teg:

- Navn
- Bústaður
- Telefonnummar
- Teldupostur
- Kontonummar

Persónupplýsingar um veitarar og samstarvsfelagar verða samlaðar grundað á fylgjandi endamál:

- Til viðgerð av okkara keypi/veitan
- Fyrisiting av tínum sambandi við okkum

Hesar upplýsingar samlast grundað á fylgjandi lógarheimild:

- Viðgerðin verður gjørd grundað á: Avtala. sbrt. §8, stk. 1, nr. 2 í dátuverndarlógini

Upplýsingarnar verða goymdar so leingi, sum tað sambært reglugerðini er loyvt , og vit strika tær, tá vit ikki hava tørv á teimum longur. Tíðarskeiðið er treytað av, hvørjar upplýsingar eru, og hví tær verða goymdar. Vanliga verða upplýsingar viðvíkjandi veitarum og samstarvsfeløgum strikaðar, eftir at avtalan er endað, ella tá ið mett verður, at samskiftið ikki er viðkomandi longur.

- Upplýsingar um veitaran strikast 5 ár eftir, at seinasta samskiftið var, kundin biður um tað, ella tá ábyrgdin fyri keyptar vørur er útgingin

### Starvsumsóknir/umsøkjarar
Tá ið vit móttaka eina starvsumsókn og fylgiskjøl, verða øll skjølini lisin av tí ávísa leiðaranum við tí endamáli at svara og meta um innihaldið í samband við eitt ávíst arbeiði. Okkara lógarheimild til viðgerðina av umsóknini er: Heimilað áhugamál. sbrt. §8, stk. 1, nr. 6 í dátuverndarlógini.

Umsókn og fylgiskjøl verða deild víðari innanhýsis til persónar, sum eru í setanarbólkinum, og verða ikki víðarigivin til onnur uttanfyri fyritøkuna.

Persónupplýsingar, sum koma fram í setanartilgongdini, verða viðgjørdar við fylgjandi grundarlagi: Heimilaðu áhugamál. Tað eru áhugamálini hjá bæði felagnum og tí skrásetta, at persónupplýsingarnar verða viðgjørdar í samband við setanartilgongdina.

Umsóknir og fylgiskjøl verða goymd, til rætti umsøkjari er funnin, og setanartilgondin er endað. Eftir hetta verða umsókn og fylgiskjøl strikað. Um ynski er at goyma umsóknina og fylgiskjøl, skal felagið hava samtykki til hetta.

Tá ið talan er um óbidnar umsóknir, verður avgjørt, um umsóknin skal goymast, so skjótt sum hon er móttikin. Um niðurstøðan er, at hon skal goymast, verður biðið um samtykki frá umsøkjaranum at goyma umsóknina, annars verður noktandi svar sent, og umsóknin strikað beinanvegin.

Um umsókn og fylgiskjøl verða goymd í meiri enn 12 mánaðir, skal biðjast um eitt nýtt samtykki frá umsøkjaranum.

Títt samtykki er sjálvboðið, og tú kanst til eina og hvørja tíð taka tað aftur við at venda tær til okkum. Nýt kontaktupplýsingarnar omanfyri, um tú ynskir fleiri upplýsingar.

## Aðrar upplýsingar um viðgerð

### Trygd
Vit hava sett hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk í verk fyri at tryggja, at tínar upplýsingar av tilvild ella ólógliga ikki verða slettaðar, almmannakunngjørdar, burturblivnar, minka í virði, at nakar óviðkomandi fær hendur á tær, verða misbúktar ella á ein ella annan hátt verða viðgjørdar í stríð við lógina. Dátuábyrgdarin tryggjar, at viðgerðin bert kann fara fram, tá ið allar dátutrygdarreglar verða fylgdar iflg. Dátuverndarlóginia § 7.

- Allur dátuflutningur og goymslan av persónupplýsingum er mett trygg, firewall er installerað, anti malware er á øllum teldunum. Backup verður tikið, og mannagongd fyri at endurstovna data er gjørd. Atgongd til persónupplýsingar er bygd á brúkara-ID og persónligt loyniorð vm.

### Dataminimering

Vit savna, viðgera og goyma bert persónupplýsingar, sum eru neyðugar í sambandi við at náa okkara ásettu endamál. Harafturat kann tað verða lógargivið, hvat slag av persónupplýsingum er neyðugt at savna og viðgera í samband við okkara virksemi. Nøgdin og slagið av persónupplýsingum, vit viðgera, kann verða ásett av tørvinum at halda eina avtalu ella øðrum lógarásettum skyldum.

### Dagførdar upplýsingar

Okkara tænasta er treytað av, at tykkara upplýsingar eru rættar og dagførdar, og vit biðja tykkum upplýsa okkum um týðandi broytingar í tínum upplýsingum. Tit kunnu nýta kontaktupplýsingarnar omanfyri at siga okkum frá um broytingar á hesum øki, so syrgja vit fyri at dagføra tínar persónupplýsingar. Um vit sjálvi leggja merki til, at upplýsingarnar ikki eru rættar, dagføra vit upplýsingarnar og geva tær boð um hetta.

### Víðarigevan av upplýsingum

Vit brúka fleiri triðjapartar til goymslu og viðgerð av upplýsingum, herímillum veitarar av kt-loysnum, myndugleikum sum TAKS og bankar, grannskoðara osv.. Hesi viðgera bert upplýsingar okkara vegna og skulu ikki brúka tær til egið endamál. Í týðandi førum verður dáta víðarigivið til sakførarar, inkasso, bankar flutningsfeløg osfr..

Vit brúka dátuviðgerðir úr EU ella tryggum triðjalondum, sum hava neyðugu trygdarviðurskiftini í ordan, umframt feløg í londum, sum kunnu veita nøktandi dátuverndartrygd.

Inventar Tænastan hevur eina Facebook síðu og ein Instagram profil, og víst verður til privatlívspolitikkin hjá Facebook her

## Tíni rættindi

- Tú hevur til eina og hvørja tíð rætt til at fáa upplýst hvørjar upplýsingar, vit viðgera um teg, hvar tær koma frá, og hvat vit brúka tær til. Tú kanst eisini fáa upplýst, hvussu leingi vit goyma tínar persónupplýsingar og fáa at vita, hvør fær upplýsingar um teg í tann mun, vit víðarigeva upplýsingar í Føroyum og uttanlands.

- Um tú biður um tað, kunnu vit upplýsa/geva tær upplýsingarnar, sum vit viðgera um teg. Heimild kann tó verða avmarkað, um privatlívið hjá øðrum skal verjast, handilsloyndarmál og ólikamlig rættindi.

- Um tú heldur, at persónupplýsingarnar, sum vit viðgera um teg, eru skeivar, hevur tú rætt til at fáa tær rættaðar. Tú skalt venda tær til okkum og upplýsa okkum um, hvar feilurin er, og hvussu tað kann rættast. Vit heita á teg um at vera neyvur um tínar umbidnu rættingar, ella kann tað gerast trupult hjá okkum, og tað kann í ávísum førum føra til, at vit ikki kunnu eftirlíka tínar rættingar.

- Í summum førum hava vit skyldu at strika tínar persónupplýsingar. Tað verið seg galdandi, um tú t.d. tekur eitt møguligt samtykki aftur. Um tú heldur, at tínar upplýsingar ikki longur eru neyðugar í samband við tað endamál, sum vit heintaðu tær til, so kanst tú biðja um at fáa tær strikaðar. Tú kanst eisini seta teg í samband við okkum, um tú heldur, at tínar persónupplýsingar verða viðgjørdar ímóti lógini ella øðrum rættsligum avtalum.

- Tú hevur rætt til at senda eina klagu til dátueftirlitið (www.dat.fo)

Dátueftirlitið
Tinganes
Postboks 300
FO-110 Tórshavn
Tlf.: (+298) 309100
Teldupostur: dat@dat.fo

- Tú hevur rætt at nokta okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum. Tú kanst eisini nokta, at vit víðarigeva tínar upplýsingar til marknaðarføring. Tú kanst brúka okkara upplýsingar her ovast til at senda tína klagu. Um tín klaga er heimilað, syrgja vit fyri at steðga viðgerðini av tínum persónupplýsingum.

- Tú hevur møguleika at gera brúk av dátaportabilitet, um so er, at tú ynskir at tínar upplýsingar verða fluttar til ein annan dátaábyrgda ella dátaviðgera

- Vit strika tínar persónupplýsingar, tá tær ikki longur eru neyðugar til tað endamálið, sum tær vóru samlaðar til

Tá ið tú vendir tær til okkum við eini áheitan um at rætta ella strika tínar persónupplýsingar, kanna vit, um tú lýkur treytirnar, og so gera vit broytingarnar ella strika upplýsingarnar so skjótt sum gjørligt.

Tú kanst brúka tíni rættindi við at venda tær til okkum. Okkara upplýsingar sært tú ovast í skjalinum

------------

Seinast dagført: 09.08.2023